**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstroling á Landgrunninum. Túrur nr. 1806.**
**Tíðarskeið: 21/02-07/03 – 2018**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Guðrun Bjarnadóttir Bech (Fyrri helvt), Helga Bára Mohr Vang, Ian Salter (fyrri helvt), Jens Arni Thomassen, Mourits Mohr Joensen (Seinni helvt) og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Helga Bára Mohr Vang, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldu vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu og upsa.

**Aðrar uppgávur:** Ian Salter var við á fyrri helvt av túrinum og tók hann vatnprøvar við CTD-ini, til at nýta til sína verkætlan "Ein lovandi háttur at meta atlantstoskastovnin á Føroya Banka við at nýta umhvørvis DNA[1]" Á seinni helvt av túrinum vórðu hesir prøvar tiknir av fólki frá Havstovuni.
Eftir fyrispurning frá Fiskaaling, vóru øll rognkelsi (3) fingin á túrinum fryst og verða latin Fiskaaling til víðari kanningar.
Harumframt vóru eisini tiknir prøvar av hýsu og toski, sum ein enskur PhD studentur skal nýta til molekylærar kanningar.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 m og 120. Seabird CTD við rosettu. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini hóskvøld kl. 21.30 og byrjaðu prøvatøku morgunin eftir eystanfyri á Sandoyar/Suðuroyarbanka. Ein partur av CTD-spælinum sent til umvæling á Skipasmiðjuni, og tískil fingu vit ikki tikið prøvar við CTD fyrsta dagin. Leygarkvøldið fóru vit inn á Havnina og fingu umvælda partin umborð. Vit landaðu mikudagin 28/2 og skiftu samtíðis ein part av manningini frá Havstovuni. Veðrið var av tí allar besta allan túrin og tilsamans vórðu tikin 62 hál, og einans var neyðugt var at endurtaka eitt hál.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 21. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 14.apríl.

**Fyribilsúrslit:**
Nakað minni var at fáa av tosk og upsa, samanborið við í fjør. Av hýsu var áleið tann sama nøgdin at fáa. Nógv var at fáa av hvítingsbróður á øllum higartil kannaðum økjum á Landgrunninum.Fiskurin er væl fyri og nógv var av nebbasild og hvítingsbróðir í fiskamagunum. Endaligu úrslitini verða klár tá seinni yvirlitstrolingin á Landgrunninum er lokin, tann 21. mars.

---

1 A complimentary approach to Atlantic cod stock assessment on the Faroe Bank using environmental DNA samples

**Talva 1:** Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1806, yvirlitstroling á Landgrunninum í februar/mars 2018.

| Slag | KG í 62 hálum 2018 | Nytrur | Magar | KG í 52 hálum í 2017 | Lutfall kg pr. hál |
|---|---|---|---|---|---|
| Hýsa | 12977.46 | 702 | 130 | 10715.291 | 1.02 |
| Toskur | 10235.10 | 703 | 101 | 14075.344 | 0.61 |
| Svartkjaftur | 3794.34 | 30 | | 1161.764 | 2.74 |
| Hvítingsbróðir | 3782.26 | | | 402.727 | 7.88 |
| Gullaksur | 3603.29 | | | 1104.681 | 2.74 |
| Upsi | 2000.84 | 632 | 110 | 8406.104 | 0.20 |
| Hvítingur | 1891.10 | 10 | | 454.641 | 3.49 |
| Lítli kongafiskur | 1744.77 | | | 795.162 | 1.84 |
| Longa | 618.02 | | 17 | 460.58 | 1.13 |
| Stóri kongafiskur | 511.69 | | | 163.91 | 2.62 |
| Reyðsprøka | 282.90 | | | 368.033 | 0.64 |
| Knurrhani | 196.31 | | | 82.466 | 2.00 |
| Tunga | 195.05 | | | 202.866 | 0.81 |
| Sandsprøka | 145.87 | | | 130.81 | 0.94 |
| Silvur murtur | 109.28 | | | 1395.85 | 0.07 |
| Havmús | 106.53 | | | 144.153 | 0.62 |
| Havtaska | 64.57 | 15 | 3 | 42.872 | 1.26 |
| Hvassasprek | 52.96 | | | 4.084 | 10.88 |
| Mathøgguslokkur | 39.73 | | | 92.284 | 0.36 |
| Kjaftsvarti hávur | 35.10 | | | 30.455 | 0.97 |
| Brosma | 31.30 | 20 | 3 | 33.35 | 0.79 |
| Blálonga | 30.38 | 21 | 11 | 1.62 | 15.73 |
| Kjaftsvarti kongafiskur | 27.45 | | | 59.337 | 0.39 |
| Lítla brosma | 21.84 | | | 38.802 | 0.47 |
| Agnhøgguslokkur | 19.68 | | | 0 | |
| Skøta (Batis) | 19.02 | | | 0 | |
| Gamal fiskur | 18.88 | | | 98.395 | 0.16 |
| Rognkelsi | 14.28 | | | 99.179 | 0.12 |
| Lálla | 13.04 | | | 30.738 | 0.36 |
| Tindaskøta | 12.17 | | | 0 | |
| Ulvfiskur | 8.84 | | | 0 | |
| Skrambul | 8.18 | | | 8.636 | 0.79 |
| Streymsild | 7.13 | | | 20.803 | 0.29 |
| Sild | 6.14 | | | 7.799 | 0.66 |
| Øða | 5.18 | | | 4.238 | 1.02 |
| Igulker | 3.94 | | | 7.649 | 0.43 |
| Steinbítur | 3.74 | | | 4.905 | 0.64 |
| Kalvi | 1.98 | | | 0 | |
| Trantkongafiskur | 1.69 | | | 113.675 | 0.01 |
| Sjósól | 1.63 | | | 0 | |
| Hvalspyggj | 1.14 | | | 0.753 | 1.27 |
| Glýsufiskur | 0.85 | | | 25.279 | 0.03 |
| Gaggukrabbi | 0.71 | | | 0.17 | 3.50 |
| Glaskvoysa | 0.42 | | | 15.42 | 0.02 |
| Makrelur | 0.41 | | | 0.788 | 0.44 |
| Krossfiskur | 0.41 | | | 6.548 | 0.05 |
| Nebbasild | 0.32 | | | 0.301 | 0.89 |
| Rækja | 0.12 | | | 0 | |
| Svampur | 0.09 | | | 0.914 | 0.08 |
| Gagga (deyð) | 0.05 | | | 0.514 | 0.08 |
| Eledone | 0.02 | | | 0 | |
| Tilsamans | 42648.17 | 2133 | 375 | | |

Havstovan 21/3-2017

Helga Bára Mohr Vang